# Einki er avgjørt

**ÍF og B68 spældu ein javnan og tættan dyst í fyrru hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið í Fuglafirði mikukvøldið. Fuglfirðingar vunnu dystn 2-1, men tað kundi eins væl verið toftamenn, ið fór avstað við sigrinum**




*Albert Sævarson í B68-málinum er hægstur og fær bóltin av vandaleið, meðan Eyðstein Skipanes spentur fylgir við gongdini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Alt er púra opið undan seinnu hálvfinaluni á Toftum, sum verður leikt 24. juli. Skal metast út frá dystinum mikukvøldið, er tað als ikki ógjørligt hjá B68 at basa ÍF og vinna sær sess í finaluni á ólavsøku.

### Fuglfirðingar byrjaðu best

Ikki óvæntað legði ÍF trýst á toftamenn frá fyrsta bríksli. Útgangsstøðið hjá fuglfirðingum var rættuliga offensivt við Magna á Lakjuni, Sylla Ahmed og Hanus Eliasen sum áleyparum. Hanus var kanska miðvallari á taktiktalvuni, men hann leikti meiri sum áleypari.

Stóra trýstið gav fuglfirðingum nakrar hálvar møguleikar, men kontanta verjuspælið hjá toftamonnum gjørdi sítt til, at tað sjáldan var tann heilt stóri vandin á ferð.

Hóast toftamenn ikki megnaðu at spæla seg til nakrar serliga møguleikar í fyrra hálvleiki, so fingu teir tó onkran heilt stóran møguleika burtur úr at kalla ongum.

Tá ið eitt gott korter var farið av dystinum, fór Bartal Eliasen í ÍF-verjuni skeivur av einari langari sending frá B68-miðvøllinm, og Jóan Petur Poulsen gjørdist leysur móti ÍF-málinum. Tórður Thomsen í ÍF-málinum fekk tó vart fyri, og ÍF gjørdi skjótt av og fór í kontraálop, sum endaði við, at Sylla Ahmed kom at standa leysur mitt fyri, men fluktarin hjá honum fór beint oman fyri málið hjá B68.

Hesin sami Sylla Ahmed var ein støðug hóttan fyri verjuna hjá B68, men alt ov ofta bleiv tað ov fjasut hjá honum, og onki spurdist burturúr.

Men tá ið ein hálvur tími var leiktur, bragdaði hjá ÍF, og ikki óvæntað hevði Sylla ein avgerandi leiklut. Fótfimi áleyparin slapp aftur um bakkin hjá B68 úti í høgru síðu, og hann sendi skjótt ein góðan bólt inn í brotsteigin hjá B68, har Hanus Eliasen var fyrstur á og potaði í netið til 1-0.

### Álopið fekk ov lítla hjálp

Toftamenn royndu at koma upp á javnt aftur, men tað tóktist ikki sum um, at B68 hevði neyðuga hugflogið til opna sterku miðverjuna hjá ÍF við teimum báðum Símun og Bartal Eliasen. Onkuntíð var roynt at senda høgar bóltar niðan móti John Petersen, men hóast fyrrverandi landsliðskempan er sterkur við høvdinum, so hevði hann tað trupult móti teimum báðum stóru miðverjunum hjá ÍF.

Somuleiðis tóktist tað eisini sum um, at tá ið B68 royndi seg fram eftir vøllinum, so vóru teir báðir áleypararnir alt ov einsamallir, tí at miðvøllurin ikki kom farvið og stuðlaði í álopsspælinum. Hetta batnaði tó eftir steðgin.

Fyrsta løtan av seinna hálvleiki var eitt sindur tom, men so líðandi legði B68 eitt størri og størri trýst á fuglfirðingar, og tað tóktist sum um, at tað bert var ein spurningur um tíð, áðrenn B68 fór at javna.

Málið kom so, tá ið eitt gott korter var leikt av seinna hálvleiki. John Petersen vinnur bóltin heilt úti við baklinjuna í vinstru síðu. Hann leggur bóltin tvørtur um í brotsteiginum hjá ÍF til Eyðstein Skipanes, sum hegnisliga leggur bóltin út frá til Jann Inga Petersen, sum staddur áraka brotsteigarmarkið langar bóltin í netið, uttan at Tórður í ÍF-málinum hevði nakran møguleika at verja fyri.

Bæði liðini trýstu nú í eini roynd at fáa sigursmálið, og nakrir møguleikar spurdust eisini. Toftamenn kenna seg ivaleyst snýttar fyri eitt brotsspark, tá ið Jóan Petur Poulsen fór um koll eftir ein nærdyst við Eyðálv Petersen, og sum myndirnar aðrastaðnis á síðuni vísa, so høvdu toftamenn grein í sínum máli, men Petur Reinert, sum annars dømdi ein góðan dyst, lat ikki við seg koma.

### Hanus gjørdist dagsins maður

Ístaðin vóru tað fuglfirðingar, ið settu trumf á, tá ið teir góðar tíggju minuttir fyri leiklok, fingu sigursmálið. ÍF fekk hornaspark í vinstra borði, sum var sent høgt og væl innfyri. Bólturin fór framvið málinum, og við handaru stong stakk Hanus Eliasen seg upp, og hann setti krúllin undir bóltin, sum fór í netið, og so var heimaliðið aftur omaná.

B68 royndi at trýsta í eini roynd at koma upp á javnt enn einaferð, men tað nærmasta, ið teir komu, var eitt kolldømt mál.

Eitt sindur av roki var móti endanum av dystinum, tá ið innskifti Kristian Anton Andreasen rættuliga ófantaliga rendi Høgna Zachariassen um koll úti í aðrari síðuni, soleiðis at Høgni fór bóltandi út í lýsingarskeltini við vøllin. Summir mistu høvdið, og tað endaði við, at Kristian Anton hjá B68 og Fritleif í Lambanum hjá ÍF fingu hvør sítt gult kort, men rættast hevði ivaleyst verið, at báðir tveir vóru riknir av vølli.

Við 2-1 sigrinum hava fuglfirðingar besta útgangsstøði undan seinnu hálvfinaluni á Toftum og hálvatriðju viku, men hinvegin prógvaðu toftamenn, at teir saktans kunnu koppa samlaða úrslitinum, soleiðis at teir verða annað lið í finaluni á ólavsøku, men hinvegin kunnu fuglfirðingar noyðast við einum javnleiki. Harumframt er vert at hava í huga, at ÍF er í fremstu deildini, og av tí sama hava eru teir í ár meiri vanir við slíkar tættar og intensar dystir.

## FAKTA

**ÍF-B68 2-1(1-0)**
1-0 Hanus Eliasen 30.
1-1 Jann Ingi Petersen 63.
2-1 Hanus Eliasen 79.
**ÍF:** Tórður Thomsen - Fritleif í Lambanum(Sverri Ellingsgaard 89.), Bartal Eliasen, Símun Eliasen, Áki Petersen - Hanus Eliasen, Gunnar Nielsen(Atli Petersen 81.), Eyðálvur Petersen, Høgni Zachariassen - Magni á Lakjuni(Eyðun Ryggshamar 67.), Sylla Ahmed
**B68:** Albert Sævarson - Alex Troleis, Ove Magnussen, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen - Eyðstein Skipanes(Johan Dávur Højgaard 83.), Bogi Petersen (Fabricio Borges 89.), Jann Ingi Petersen, Øssur Hansen - John Petersen(Kristian Anton Andreasen 64.), Jóan Petur Poulsen
**Gult kort:** Símun Eliasen, Fritleif í Lambanum, Bartal Eliasen - Jann Ingi Petersen, Kristian Anton Andreasen
**Dómari:** Petur Reinert



*Her vildu toftamenn verða við, at teir áttu brotsspark, tá ið Eyðálvur Petersen rendi Jóan Petur Poulsen um koll. Sum myndirnar eisini vísa, høvdu toftamenn helst grein í sínum máli*

*Myndir: Álvur Haraldsen*